# ÚTSKRIFT ÚR GERÐABÓK LANDSSTÝRISINS.

Aftaná nýval av løgmanni og landsstýri var farið fram 18. december 1954, <u>hevði nývalda landsstýrið fund 20. december kl. 16.</u>

Allir vóru á fundi: K. Djurhuus løgmaður og landsstýrismenninir H. Djurhuus og Edw. Mitens.

Løgmaður byrjaði fundin við hesum orðum:

Sambandsflokkurin, Fólkaflokkurin,Framburðsfelagið og Sjálvstýrisflokkurin hava í felag skipað hetta landsstýri í tí treysti, at vit, sum valdir eru, í felag og <u>semju</u> skulu loysa tær uppgávur, sum koma at liggja fyri.

Tað skal vera mín vón, at vit koma at arbeiða væl saman, og at vit í okkara starvi verða loyalir yvir fyri teimum forútsetingum, vit eru valdir undir, og at vit vísa loyalitet móti hvørjum øðrum.

Eg gangi nú inn í samarbeiði við tykkum í tí treysti, at vit koma at arbeiða væl saman, og at tað skal eydnast okkum at gera eitt gott arbeiði fyri landi og fólki.

Áðrenn tikið varð við embætunum, váttaðu limir landsstýrisins uppá æru og trúgv, at teir vilja røkja tað embætið, tingið samsvarandi lógini um Føroya heimastýri, stýrisskipan Føroya í sermálum og Føroya umboðsvald hevur valt teir til.

Síðani varð tikið til viðgerðar:

1. <u>Býti av fyrisitingarøkjum.</u>

Fylgjandi býti varð samtykt (ávísingarnar vísa til heimastýrislógina lista A og B, soleiðis sum tey einkultu málsøkini har eru nevnd):

<u>K. Djurhuus:</u>

I. Spurningar í samband við nýskipanina (listi A, pùnkt 1).

II. Fíggjarmál, herundir eisini grannskoðan av roknskaparførslu sjúkahúsanna. (listi A, punkt 6 og 7).

III. Fiskivinnuna undantikið Føroya Fiskasølu (listi A, punkt 13 (deilvís)).

IV. Løgreglumál (listi A, punkt 14 og 16, og listi B, punkt 2).

Henda deildin verður nevnd <u>løgmannsdeildin</u>, umfatandi: Nýskipanina, fíggjarviðurskifti, fiskivinnu og løgreglu.

H. Djurhuus:

I. Samferðslumál, herundir loftferðslu undantikið radio (listi A, punkt 8 og 12, og listi B, punkt 3).

II. Landbúnaður (listi A, punkt 13 (deilvís)).

III. Handil og ídnaður, herundir Føroya Fiskasøla og ráevni í undirgrundini (listi A, punkt 15, og B, punkt 3 og 5).

Henda deildin verður nevnd samferðslu-, landbúnaðar- og handilsdeildin, umfatandi: Samferðslu, landbúnaða, handil og ídnaða.

Edw. Mitens:

I. Kommunal mál (listi A, punkt 2 og 3).

II. Heilsumál undantikið grannskoðan og roknskaparførslu (listi A, punkt 4).

III. Socialmál (listi A, punkt 5).

IV. Skúlamál og søvn (listi A, punkt 9 og 10).

V. Fólkakirkjan (listi B, punkt 1).

VI. Friðing av vyggningum og náttúrufriðing (listi A, punkt 11).

VII. Radio (listi B, punkt 3).

Henda deildin verður nevnd kommunu-, social-, mentunnar- og kirkjudeildin, umfatandi: Kommunal mál, socialmál, arbeiðsmál, heilsumál, skúlamál og fólkakirkjuna.

Samtykt varð at kunngera býtið.

2. Samtykt varð, at tá ið løgmaður hevur forfall, er Hákun Djurhuus varaløgmaður.